## Semja

Í millum øðrummegin Kommunulæknafelag Føroya (hereftir KLF) og hinumegin Fíggjarmálaráðið (FMR) verður gjørd henda semja:

**Sáttmálaskeið**

Sáttmálarnir millum partarnar frá 1. oktober 2006 (millum MSF og KLF), 28. oktober 2008 (millum HMR og KLF) og 1. oktober 2010 (millum HMR og KLF) við tilhoyrandi sáttmálum verða við broytingunum niðanfyri endurnýggjaðir fyri tíðarskeiðið 1.mai 2018 til 30. apríl 2021.

**Gjøld (basis, honorar og grundgjald)**

Grundupphæddin hækkar frá 1. mai 2018 til kr. 21.000,- Grundupphæddin verður reguleráð samsvarandi lønum hjá tænastaumonnum. Frá 1. mai 2018 hækkar eftirlønin av grundupphæddini til 15 %.

Basisgjaldið sambært § 65 í sáttmála frá 2006 verður hækkað við kr. 32. Basisgjaldið verður framyvir javnað í kr.

Gjøld fyri vitjanir í dagtíð verða rindað eftir sáttmála, ið kom í gildi í Danmark tann 1. januar 2018, tó við hesum undantøkum:

Kronikerhonorar 0130, 0131, 0132, 0133

Sygebesøg 0441, 0451 og 0461.

0431 verður broytt til: sygebesøg fra påbeg. 9 km indtil 20 km. (Zone III)

§ 61 í tabellini verður broytt til: Kørselsgodtgørelse: Godtgørelse for benyttelse af eget befordringsmiddel, jf. § 76 er den samme godtgørelse pr. påbegyndt km., som den til enhvers tid af landsstyret er fastsat for benyttelse af eget befordringsmiddel på tjenesterejser.

Gjøldini verða goldin sambært hesum frá 1. mai 2018 at rokna.

§ 95 í tabellini snýr seg um veitingar, ið kommunur eftirspyrja og gjalda og verður tí ikki tikið við í henda sáttmála.

**Partarnir eru samdir um hesi protokollat:**

**Samstarvsnevnd:** Partarnir eru samdir um í felag at arbeiða víðari við at skipa eina samstarvsnevnd og hvørjar uppgávur nevndin skal loysa.

**Tryggingarviðurskifti:** Partarnir eru samdir um, at tryggingarviðurskiftini hjá kommunulæknum eru ógreið og at neyðugt er at fáa greiðu á hesum. Tá Heilsutrygd er setanarmyndugleiki hjá kommunulæknum eru partarnir samdir um, at Heilsutrygd kannar tryggingarviðurskiftini og hevur endaliga niðurstøðu um hesi viðurskifti í seinasta lagi 1. januar 2019.

**Læknavakt:** Føroya Kommunulæknafelag og Heilsumálaráðið/Heilsutrygd eru samd um at endurskoða vaktlæknaskipanini, herundir at avloysarar fáa somu skyldur sum tann læknin, ið viðkomandi avloysir – eisini í mun til læknavaktina.

**Cosmic:** Partarnir ásanna, at tørvur er á dagføringum og tillagingum í kt-skipanini. Miðjað verður, at hesar verða gjørdar innan 1. mai 2019.

Tórshavn, tann 18. mai 2018

**Vegna Kommunulæknafelag Føroya**

Marjus Dam, formaður

**Vegna Fíggjarmálaráðið**

Kristina Háfoss, landsstýriskvinna

Súsanna Nolsøe, lønardeildin